# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



# Realskúlaflokkur í 1965

Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði í Kommunuskúlanum í Havn í summar.

Ein realskúlaflokkur í 1965. Myndin er tikin við skótahúsið við Hoydalsvegin.

Aftara rað f.v.: Echardt Persson, Grethard Poulsen, Kartin Simonsen, Bergur Djurhuus, Regin Hentze, Kári Jón Hansen, Óli Petersen, Jógvan við Ánna, lærari, Torkil Holm Petersen, Birgir Mortensen, Steingrím Abrahamsen, Bogi Mikkelsen og Ólavur Michelsen

Fremra rað f.v.: Rannvá Lindarstein, Maria Mortensen, Durid Reinert, Bette Johansen, Sigrun Joensen, Anna Katrina N. Joensen (Dukki), Brenda Thomsen, Katrin Reynheim og Hergerð Krossteig

*Myndaeigari: Anna Katrina Olsen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lisa Dam, Sandavágur**, andaðist mánadagin 3. september, 85 ára gomul. Kistan fer av Ellisheiminum á Sýnini mikudagin klokkan 18 í Sandavágs kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14.

**Christina Helena Debes**, fødd Rasmussen, ættað úr Sørvági, búsitandi í Havn, andaðist í „Heiminum við Vallalíð" týsdagin 4. september, 85 ára gomul.

**Virgar Frýdal, Tórshavn** andaðis 3. september, 90 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Eg takki øllum, sum gjørdu mær 75 ára dagin so ógloymandi. Takk fyri blómur, uppringingar og øll sum stukku inn á gólvið.

**Jastrid Rein**

**Dagurin**

**7. august. Donatus**, deyður umleið 380. Drongurin Donatus misti bæði foreldrini, og undan forfylging flýddi hann til Arezzo í Italiu. Varð prestlærdur og endaði sum biskupur har á staðnum. Seinni varð hann tikin og hálshøgdur

Lesið Sosialin - so eru tit við